# Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo






Chrysler PT Cruiser fer nú eftir øllum at døma í søguna

# PT CRUISER fer nú í søguna



*Designarin Bryan Nesbitt hevur teknað PT Cruiser*

Magnus Gunnarsson

Kendi amerikanski retrobilurin Chrysler PT Cruiser, sum hevur verið gjørdur síðan 2000, fer nú eftir øllum at døma í søguna.

Tá Chrysler komu á marknaðin við retrobilinum PT Cruiser fyri 10 árum síðan, var bilurin ein sonn sensatión. Designið var teknað við bilum frá 50-unum sum fyrimynd. Bilurin varð sera væl móttikin og hevur verið gjørdur í nógvum ymiskum útgávum.

Í sambandi við at Fiat-konsernin hevur keypt seg inn í Chrysler í USA, er avgerð tikin um at

Chrysler verksmiðjan í Toluca í Mexico nú gevst við framleiðsluni av PT Cruiser. Í staðin skal ein annar retrobilur, nevniliga Fiat 500, framleiðast á verksmiðjuni í Mexico til amerikanska marknaðin.

Tað er amerikanski designarin Bryan Nesbitt, sum hevur teknað PT Cruiser. Hann hevur eisini teknað aðrar bilar sum t.d. Chevrolet HHR, sum eisini er ein retrobilur í stíl við PT Cruiser.

Áðrenn PT Cruiser kom á marknaðin, vóru ymiskir Chrysler konseptbilar sýndir fram á bilaframsýningum sum t.d. Pronto Cruiser, sum er ein coupéútgáva av PT Cruiser.